

Onki jólaborð uttan
FØROYA BJÓR JÓLAØL

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN 1948/78

Blå obligationer med serienumre 1—1000 og løbenumre 1—2000 incl.

41. trækning 6. december 1968

Følgende større præmier er i dag udtrukket

	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.
200.000 kr.	708	277												
100.000 kr.	129	733	746	1845										
50.000 kr.	271	121	429	1335	973	1359								
25.000 kr.	180	1931	282	1387	404	1469	565	1398	734	140				
	255	1076	398	613	457	653	606	1045	636	836				
10.000 kr.	8	272	211	1455	390	232	633	1368	712	858	745	1556	806	1401
	45	1360	338	1078	624	141	655	1793	729	576	789	817	894	772
	93	1894												
5.000 kr.	25	1098	86	12	406	175	583	1043	644	315	739	1812	861	1325
	66	772	218	1193	452	1012	605	916	717	859	762	1360	889	833
	78	1699	311	48	520	1928	637	1290	734	1637	797	186	937	1250
	79	90	363	781	527	1900	642	726						
1.000 kr.	144	216	252	1732	332	1498	438	411	533	1606	665	1136	827	701
	150	1568	259	1271	339	1590	451	1999	586	446	674	1085	827	1848
serie nr.	løbe nr.	165	656	264	660	352	1046	471	1821	586	1048	694	1127	829	439
		172	1469	269	752	353	1084	501	1828	595	992	716	238	833	1452
7	1332	173	1205	271	1137	363	1096	506	1411	605	869	725	134	840	1865
15	1611	194	730	273	1432	365	1136	510	1228	607	317	732	1209	871	726
19	105	203	1278	276	1082	367	950	511	599	612	1932	738	812	874	669
38	1077	211	1246	279	1789	386	164	529	693	613	892	750	977	875	594
59	1088	220	1564	282	850	393	1932	530	141	627	1777	763	1095	895	1864
61	1766	229	1232	289	1041	391	877	529	577	643	149	776	1592	900	1042
115	1098	244	189	301	1556	402	1092	559	1703	654	424	786	1140	961	1903
135	772	245	1214	328	821	415	106	561	1849	658	1009	801	1794	999	1824
139	296	251	1905	331	735	415	1875	581	1940	663	245	903	754	990	1379

Den officielle trækningsliste indeholdende samtlige 6756 præmier samt numrene på endnu ikke hævede præmier fra tidligere trækninger vil kunne købes for 35 øre i bladudsalgene fra den 17. december d. å. Trækningslisten vil i øvrigt fremligge til eftersyn i postkontorer, amtstuer og toldkasser. **Udbetaling af præmier af alle størrelser foregår ved Danmarks Nationalbank, amtstuer og endvidere uden for København ved toldkasser fra og med den 18. december d. å.** Af kontrolhensyn vil der for obligationer, på hvilke der er faldet præmier på 5000 kr. eller større beløb, hengå nogle dage mellem obligationernes indlevering og præmiernes udbetaling. Præmier, der er faldet i denne trækning, skal være hævet senest den 18. december 1971. Efter denne dato er de forældede.

Finansministeriet

FÆRØSK MARGARINE

Vita No 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

Tryggingarsambandið FØROYAR

Føroya Kriggstrygging	Tlf. 1090
Føroya Sjóvátrygging	- 1090
Føroya Brunatrygging	- 1098
Føroya Vanlukkutrygging	- 1466

Vit tryggja:

Bátar, skip, vørur, hús, innbúgv, akfør o. a.

Føroyingar eiga at tryggja í landsins egnu trygging.

Skula tit brúka bil

persónkoyring ella skúlakoyring, so snarið **tlf. 3456**

Alexander Dalfoss

70 ÁR. Leygardagin 28. des. verður Elin Margreta Matras, Stongunum, Klakksvík, 70 ár.

---

fíggindaherin við øllum sínum stríðskempum; teir koma sum eitt óløgi og høgga niður frá hendi, rudda slóð fyri sær, hvar teir koma, og tað var skjótt, at fíggjandaherurin tók til rýmingar; men kongasonurin og hansara menn elta teir og gevast ikki fyrr enn eingin maður er eftir á livi av fíggjindanum. Tá venda teir aftur, ikki at hitta kong, men sleppa sær eftir einum umveg ósæddir aftur á skógin. Kongasonurin ropar aftur: »Jarnhanus!«

Villmaðurin kemur beinan vegin og sigur: »Hvat vil tú mær nú?«

»Her hevur tú hestin og menn tínar. Gev mær nú ta gomlu lavnu ryssuna aftur.«

»Tað skal tú fáa.« segði villmaðurin og so hvarv hann millum tróini. Um eina løtu kom fjóskallurin við ryssuni og teimum gomlu klæðunum. Drongurin skifti, setti seg á ryssuna og skinklaði heim aftur til urtagarðsmannin.

Tá ið kongurin kemur aftur úr bardaganum, kemur prinsessan ímóti honum og vil heiðra hann fyri sigurin. Tá sigur kongur: »Eg havi ongan sigur vunnið, men ein riddari kom mær til hjálpar við øllum stríðskempum sínum; tað er hann sum skal heiðrast, tí tað var hann sum vann.« Prinsessan vildi fáa at vita, hvør hesin riddari var. Nei, tað visti kongur ikki at siga, tí hann elti fíggindan og bardi hann niður, og so sá eg hann ikki aftur.

Prinsessan spurdi urtagarðsmannin um dreingin. »Jú hann var rætt nú aftur komin, og hann læði at honum, »kom støplandi á tí tríbeintu ryssuni. Hinir høvdu argað hann, og spurt hvørjum steini hann krógv aði seg undir tá ið stríðið stóð. Men hann svaraði, at hann hevði stríðst manniliga, og at tað var hann, ið gjørdi, at teir vunnu; tess meira læðu teir at honum.«

Kongur sigur við prinsessuna: »Eg fari at gera eitt stórt gildi, og tú skal kasta eitt gullepli niður ímillum riddararnar. Kanska tann ókendi kemur við.«

Tá ið urtagarðsdrongurin hoyrir innbjóðingina til veitsluna, fer hann á skógin at ropa á Jarnhanus: »Hvat ynskir tú nú,« spyr villmaðurin. »At eg lofti gulleplinum, ið prinsessan kastar.« »Tað, skal ikki standast á,« svarar Jarnhanus, »eg vil eisini geva tær reyð herklæði og reyðan hest at ríða til veitsluna á.

Tá ið veitsludagurin kemur, fer kongasonurin stásiliga ríðandi og verður standandi ímillum hinar riddararnar; eingin kennir hann. Nú trínir pinsessan fram og kastar gulleplið í mannamúgvuna; kongasonurin loftar tí. So skjótt hann hevur tað í hondini, ríður hann burtur. Næsta dagin gevur Jarnhanus honum hvít herklæði og hvítan hest. Aftur loftar hann gulleplinum og ríður so burtur sum snarast. — Nú verður kongur illur og sigur: »Tað er ikki fyri mark, at ríða burtur við gulleplinum; tann sum tað fær, skal koma fram fyri kong og siga hvør hann er. Hendir hetta aftur, sendi eg mínar menn eftir honum, og gongur tað ikki betur, skulu teir hava loyvið at bera vápn á hann« — Tríðja dagin gav Jarnhanus dreinginum svartan herbúnað og svartan hest. Aftur loftar hann gulleplinum, sum prinsessan kastar, reið so burtur sum snarast. Men tá løgdu kongsins menn aftaná honum, og ein kom honum so nær, at hann særdi hann í beinið við svørðsoddinum. Hann slapp frá teimum kortini; men hesturin leyp so óstortsliga, at hjálmurin feyk av honum, og øll kundu síggja hansara gylta hár. Menninir ríða nú aftur og siga kongi hetta.

Næsta dagin fer prinsessan til urtagarðsmannin og spyr hvar drongurin er. »Jú,« sigur urtagarðsmaðurin, »hann arbeiðir í urtagarðinum. Tað er ein løgin stavnur; hann hevur verið við til veitsluna og kom ikki aftur fyrr enn í gjárkvøldið; tá hevði hann trý gullepli, sum hann hevði vunnið, at vísa børnunum.« Nú sendir kongur boð eftir honum, og tá ið hann kemur, er hann aftur undir húgvu; men prinsessan fer til hansara og tekur húgvuna av honum. Tá floymdi hansara gula hár niður yvir akslarnar, og tað skein so fagurliga, at øll undrast á.

Nú spyr kongur: »Er tú tann riddarin, sum hvønn dag kom til veitsluna í ymiskum herklæðum og loftaði teimum trimum gulleplunum?«

»Ja, og her eru tey,« sigur kongasonurin, og tekur tey upp úr lummanum og gevur kongi. »Og vilja tygum hava fleiri prógv, kunnu tygum síggja sárið, tygara menn góvu mær í beinið, tá ið teir eltu meg. Men eg eri eisini tann riddarin, sum hjálpti tygum til at vinna fíggindaherin.«

Nú sigur kongur: »Tá ið tú kann gera sovorðnar skreytir, er tú eingin vanligur urtagarðsdrongur; sig mær hvør faðir tín er.«

»Faðir mín er mikil kongur, og eg eigi alt tað guli, eg kann ynskja mær,« svarar kongasonurin.

Kongur sigur: »Eg siggi, at eg havi nógv at takka tær fyri. Er tað eitthvørt, eg kann gera fyri teg?«

»Ja,« svarar kongasonurin, «eitt nógv umráðandi ting kunnu tygum gera; gevið mær dóttir tygara til konu.« Tá læði prinsessan og segði: »Hann hevur ikki viljað gjørt vart við seg; men eg havi leingi sætt av hansara gylta hári, at hann var eingin vanligur urtagarðsdrongur.« Kongasonurin fór nú til hennara og kysti hana.

Har komu bæði faðir og móðir hansara í brúdleypið. Og tað var mikil gleði; tí tey høvdu fyri langt síðani mist alla vón um at síggja hann aftur á lívi.

Tá ið tey sótu við brúdleypsborðið, tagnaði tónleikurin so brádliga, og ein mikil kongur við stórum fylgi trein inn í høllina, gekk fram til kongasonin, fevndi hann og segði: »Eg eri Jarnhanus, sum varð umskaptur í villmannalíki; men tú hevur loyst meg úr gandinum, og nú skal tú eiga allar mínar miklu dýrgripir.«

Heðin Brú, umsetti.